# Útbjóðingarskriv

Leitað verður eftir ráðgeva at standa fyri forkanning um framtíðar nýtslu av vitlíki hjá landinum.

## Um uppgávuna

Í nýggjastu heildarætlanini fyri talgilding av samfelagnum, “*Talgilding av samfelagnum heldur fram – 2025-2027*”, sum varð samtykt við verklagslóg í Løgtinginum í vár, er í átaki 15 nevnt, at “*Landsstýrið hevur sum mál at leggja eina heildarætlan fyri vitlíki, sum skal seta út í kortið hvussu samfelagið fær sum mest burturúr tøknini og hvussu vit verja okkum sum frægast fyri váðunum.”*

Nú málsøkið vitlíki er latið Fíggjarmálaráðnum at umsita, hevur landsstýriskvinnan í fíggjarmálum heitt á Gjaldstovuna at útinna hetta málsøkið.

Avgjørt er at byrja hesa tilgongd við at gera eina forkanning. Forkanningin hevur til endamáls, at:

- Orða eina visión fyri landsins nýtslu av vitlíki.
- Verða grundarlagið undir gerð av einari landsfevnandi heildarætlan um vitlíki.

Fyri at náa hesum máli verður ein partur av uppgávuni at fáa íblástur úr grannalondum til gerð av heildarætlanini um vitlíki, og at fáa íkast frá stovnum og øðrum áhugapørtum um gagnnýtslu av vitlíki.

Forkanningin er sostatt at rokna sum eitt fyrireikandi stig, áðrenn farið verður í gongd við sjálva heildarætlanina.

### Veitingin

Ráðgevin fær til uppgávu at standa fyri forkanningini. Veitingarnar eru í høvuðsheitum greining, verkætlanarleiðsla og samskipan. Ítøkiliga at:

- skipa forkanningar-verkætlanina
- standa fyri leiðslu av verkætlanini
- skipa fyri verkstovum við áhugapørtum
- fáa í lag samband við relevantar samstarvsfelagar í grannalondum
- greinað úrslit frá verkstovum og vitjanum
- gera skrivliga frágreiðing og framløgu av úrslitunum av forkanningini. Frágreiðingin og framløgan
    - skulu hava eina orðaða visión fyri vitlíki,
    - skulu verða uppskot til ætlan fyri næstu stigini, herundir tíðar- og kostnaðarætlan,
    - skulu orðast sum tilmæli, sum kunna leggjast fyri Fíggjarmálaráðið og í øðrum lagi landsstýrið at taka støðu út frá

## Sáttmáli og karmar

Ein sáttmáli verður gjørdur við veitara, sum skal bjóða fram navngivið starvsfólk, sum hevur allar teir førleikar okkum tørva. Veitari kann bjóða fram í mesta lagi tveir ráðgevar, t.d. ein, ið stendur fyri verkætlanarleiðsluni og einum samskipara.

Veitarin verður tímaløntur fyri sítt arbeiði sambært tímaprísinum, ið veitarin bjóðar í sínum tilboði.

Talan er um eina eingangsveiting, sum er lýst niðanfyri. Sáttmálatíðarskeiðið er frá, at sáttmáli verður undirskrivaður í september til umleið ársskiftið 2025. Talan verður um eina tímarammu á 400-500 tímar.

Um talan verður um eina fasu tvey, og ynski er frá báðum pørtum at leingja samstarvið, kann sáttmálin verða longdur við í mesta lagi 12 mánaðum.

Sáttmálauppskot verður hjálagt.

## Krøv til veitingina (førleikakrøv)

Ráðgevin, sum veitarin bjóðar fram, skal

- hava gott innlit í vitlíki á einum strategiskum og samfelagsligum stigi
- hava royndir við at leiða strategiskar tilgongdir ella hava drúgvar royndir við verkætlanarleiðslu
- duga væl at orða seg á skrift og talu, á bæði føroyskum og enskum

Vit vænti haraftrat, at ráðgevin hevur áræði, er forvirkin í sínari tilgongd at loysa uppgávur og hevur góðar greiningarførleikar. Tað ein fyrimunur, um hann hevur vitan um hvussu vitlíki kann verða gagnnýtt í breiðum samfelagsligum høpi. Harumframt er tað ein fyrimunur, um ráðgevin hevur hægri útbúgving, sum er relevant í mun til fyrrnevndu førleikar.

## Tilboðið skal innihalda

**Góðska**

Tilboðsgevari skal fyrst og fremst lýsa førleikar og royndir hjá ráðgeva/ráðgevum. Haraftrat skal tilboðsgevari koma við sínum boði upp á, hvussu hann ímyndar sær, at loysa uppgávuna, herundir leist, tilgongd og háttalag.

**Prísur**

Tilboðsgevari skal áseta tímaprís fyri veitingina. Prísirnir skulu verða uttan mvg.

Prísur og góðska skal skrivast inn í fylgiskjalið sum er lagt við útboðnum.

## Hvussu verður vektað

Innkomnu tilboðini verða vektað soleiðis: Góðska 50% og prísur 50%

Útrokningin fer fram á henda hátt:

## Góðska

Út frá samlaðari meting av:

- Førleika og royndum at leiða líknandi strategiskar tilgongdir
- Førleikar og royndir innan verkætlanarleiðslu
- Boð upp á hvussu tilboðsgevari ímyndar sær, at uppgávan verður loyst
- Útbúgving
- Heildarmynd

Stigatal verður grundað á ein skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal.

Vit gera vart við, at hetta er okkara kvalitativa meting av góðsku, soleiðis sum vit meta um innkomna tilfarið.

## Prísur

Út frá tímaprísinum.

Tilboðið við lægsta tímaprísi fær 50 stig. Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli: Tilboð við lægsta tímaprísi/tímaprísur í tilboði, ið skal metast x 50.

Lægsti tímaprísurin í frymlinum kann aldrin vera lægri enn 600 kr., t.e. at bjóðar ein veitari tímaprís lægri enn 600 kr., verður tímaprísurin ásettur til 600 kr. í metingini.

Prísirnir skulu verða uttan mvg.

# Dømi um útrokning

Góðska
Tilboð 1: Hesin veitarin skorar lægst, tí ráðgevararnir hava fáar og ikki so viðkomandi royndir og førleikar og hava ikki viðkomandi ella umfatandi útbúgving. Hesin fær 20 stig.
Tilboð 2: Hesin veitarin skorar miðal, tí royndir, førleikar og útbúgving er á einum miðalgóðum stigi. Hesin fær 35 stig.
Tilboð 3: Hesin veitarin skorar hægst, tí ráðgevararnir hava tær bestu og drúgvastu royndirnar, førleikarnar og útbúgvingina. Hesin fær 50 stig.

Prísur
Tilboð 1: Tilboðið við lægsta miðal tímaprísi hjá veitaranum er 600 kr. Hetta gevur 50 stig.
Tilboð 2: Næstlægsta tilboðið er 750 kr. Hetta gevur 600/750 x 50 = 40 stig
Tilboð 3: Triðlægsta tilboðið er 900 kr. Hetta gevur 600/900 x 50 = 33,3 stig

Samlað meting
Tilboð 1: Førleikar 20 stig + miðal tímaprís 50 stig = samlað meting á 70 stig.
Tilboð 2: Førleikar 35 stig + miðal tímaprís 40 stig = samlað meting á 75 stig.
Tilboð 3: Førleikar 50 stig + miðal tímaprís 33,3 stig = samlað meting á 83,3 stig. Hesin veitarin vinnur sostatt útboðið.

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku/førleikar.

### Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at neyvlýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreytir.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing um avgerðina.

Útbjóðari tilskilar sær rættin, ikki at taka av nøkrum tilboði, um mett verður at góðskan er ov vánalig, ella prísirnir ov høgir.

## Um Gjaldstovuna

Á Gjaldstovuni vilja vit gera Føroyar effektivari.

Hetta stóra mál royna vit at lyfta á fleiri mótum. Vit vilja, at okkara landsbúskapur er skynsamt fíggjarstýrdur við neyvum fíggjartølum. Vit vilja, at stovnar landsins skulu hava bestu og mest framkomnu kt-loysnir. Vit vilja, at innkeyp hjá landinum verður kappingarútsett, so vit fáa meira fyri peningin. Og so vilja vit ganga undan at gera Føroyar til eitt av mest talgildu samfeløgum í heiminum.

Á Gjaldstovuni starvast umleið 70 fólk.

## Hentar upplýsingar

Tilboðsgevari hevur møguleikan at fáa fleiri upplýsingar við at seta skrivligar spurningar. Spurningar skulu sendast til simunpetur@talgildu.fo

Spurningar, ið eru settir fyri mánadagin 15. september 2025, kl. 12.00, verða svaraðir í seinasta lagi 17. september. 2025, kl. 12.00.

Spurningar verða svaraðir skrivliga. Allir spurningar og øll svar kunnu síggjast dulnevnd á keypsportal.fo

Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði.

Freist **22. september 2025 kl. 12.00**

Tilboð skulu sendast til **keypsportal@gjaldstovan.fo**